# Hanus hittir Týr

**Forkunnug dupultkonsert í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið 22. august kl. 21**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*





Eins og Pál Joensen, Katrin Olsen, Eivør og Teitur, hoyrir Týr við til teir føroysku úrmælingarnar, sum klára seg sera væl á altjóða palli. Teir hava spælt á nógvum festivalum og til ymsar konsertir bæði í Týsklandi, Hollandi, Noregi, Danmark og Bretlandi. Víkinga- og fólkametal fjepparar í hópatali hava sostatt hoyrt teir live, har teir hava framført góð gomul eins og nýggj løg.

Men hóast teir eru fløguaktuellir við Land, hava Týr ikki spælt í Føroyum síðani fløgan kom út, so føroysku fjeppararnir hava ikki verið eins hepnir, sum fjepparar í Europa. Men nú er eitt gylt høvi!! Týr vera ein stuttan støðg í Føroyum nú, og einasta konsertin á føroyska meginlandinum verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði fríggjakvøldið 22. august kl. 21.

Altíð aktuelli og sera vælumtókti fólkatónleikarin Hanus G. Johansen, sum m.a. hevði eina framúr konsert á Summarfestivalinum, byrjar konsertina og fær áhoyrarnar í rætta hýrin at hoyra fólka-metal! Mentanarhúsið væntar at nógvir glaðir Týr fjepparar og Hanus-elskarar vera at síggja til eitt brak av einari dupultkonsert í Fuglafirði.

Atgongumerkini til hesa forkunnugu konsert vera at fáa í forsølu á Kunningarstovunum kring landið. Í forsølu kostar atgongumerki kr. 200, og við hurðina kosta tey kr. 250.

---

# Fornminnissavnið farið at skráseta skipsvrak við Føroyar

**Fornminnissavnið hevði fingið ein marin-fornfrøðing frá Víkingaskipshøllini í Roskilde at halda skeið fyri frítíðarkavarum um arbeiðshættir í sambandi við varðveiting av mentanarvirðum í sjónum. Síðsta vikuskiftið var kavað við rovini av sluppinni Golden Harp í Hvalvík**

FORNMINNI
*Tíðindaskriv*
*Fornminnissavnið*

Síðsta vikuskiftið undraðu mong, ið koyrdu fram við í Hvalvík, seg yvir fólk í froskmannaklæðum, ið vóðu úti á eyðkendu skipsrovunum útfyri har. Vrakið er av sluppini Golden Harp frá 1876, ið Selatraðsmenn keyptu til Føroya í 1904 og Valdemar Lützen keypti í 1908. Hon rak á land í 1924 og upphøgd.

Talan var um fólk, ið vóru á skeiði í marinfornfrøði, sum Føroya Fornminnissavn skipaði fyri saman við frítíðarkavaraskúlanum Faroe-Dive í Klaksvík. Fornminnissavnið hevði fingið ein marinfornfrøðing frá Víkingaskipshøllini í Roskilde at halda skeiðið, og endamálið var at kunna føroyskar frítíðarkavarar um arbeiðshættir í sambandi við varðveiting av mentanarvirðum í sjónum. Skeiðið snúði seg m.a. um at læra teknikkir at máta upp skipsvrak undir vatni, og vrakið í Hvalvík var sera væl egnað til endamálið, tí tað liggur grunt. Seinni varð royndt á einum vraki, sluppini Súlan, sum liggur á 20 metra dýpi inni á Hulki á Strondum.

Skeiðið varð hildið fyri at seta sjøtul á tað týðandi arbeiðið, ið liggur í framhaldi av, at Løgtingið í 2004 samtykti lóg um, at mentanarvirði í føroyskum sjóøki, so sum vrak og vraklutir, sum eru eldri enn 100 ár, eru friðað. Lógin varð gjørd sum liður av viðurkenning Føroya av havrættarsáttmálanum hja ST. Føroya Fornminnissavn varðar av lógini, sum hevur við sær, at vrak og vraklutir skulu skrásetast. Endamálið við tí er at fáa til høldar vitan um mentanarlig viðurskifti, sum goymir seg í lutum í føroyskum sjóøki. Hetta gerst best við at fáa í lag miðvíst samstarv við frítíðarkavararnar.

Hvussu mong vrak krógva seg í føroyskum sjóøki hava vit lítla vitan um. Nøkur fá eru kend, serliga tey úr frá yngri tíð, sum frítíðarkavarar javnan kava niður á, men eisini nøkur eldri, og fleiri, sum vit kenna úr søguligum heimildum, eru enn ikki funnin, t.d. Norska Løva og Westerbech, sum leitað hevur verið eftir í summar. Men helst eru tey nógv fleiri, tí einki er at ivast í, at skip á bátar eru sokkin tey 1200 árini fólk hava búð í Føroyum. Tey eru sjálvandi ring at finna, tí tey líkjast ikki longur skipum. Men hóast tey nú eru lítisverd sprek, so kunnu tey geva ómetaliga vitan.

Tí er eisini neyðugt, at farið verður fram við skili, soleiðis at keldurnar ikki fara fyri skeyti. Marinfornfrøðiliga skeiðið um vikuskiftið snúði seg um tilvitan um hesi viðurskifti og var fyrsta stigið at fáa gongd á tað týdningarmikla skráetingararbeiðið, ið liggur fyri framman. At taka lutir upp, er ikki loyvt uttan við loyvi frá fornminnamyndugleikunum, og heldur ikki at órógva teir, tí upplýsingar liggja eisini í, hvussu teir liggja. Sambært løgtingslógini um vernd av fornlutum í sjónum er tilíkir ogn landsins. Lutir úr sjónum forfarast, verða teir tiknir upp og koma ikki skjótt undir køna hond.

- Fornminnissavnið er sannført um, at munagóð skráseting av vrakum einans gerst við skilagóðum samstarvi við tey, sum fáast við kaving í frítíð ella yrki, og ætlar tí, at skeið sum hetta skulu vera afturvendandi. Savnið vónar eisini, at tey, ið vita um vrak ella vraklutir á botni, hvussu lítisvert tað enn tykist, boðar sær frá, sigur Andras Mortensen, landsantikvarur í tíðindaskrivi.